## Suu Kyi sett uttanfyri

Andstøðuleiðarin í Burma, Aung San Suu Kyi, og meiri enn 2.000 aðrir politiskir fangar sleppa ikki at stilla upp á tjóðartingsvalinum, sum hernaðarstýrið hevur ætlanir um at skipa fyri. Stýrið kunngjørdi í gjár eina nýggja vallóg, sum millum annað sigur, at fólk, sum sita í fongsli, kunnu ikki vera í flokkum, sum stilla upp á valinum. Ein onnur grein í lógini sigur, at fólk, sum hava verið gift útlendingi, kunnu ikki stilla upp. Tað kann hava við sær, at Aung San Suu Kyi verður sett uttan fyri sín egna flokk, NDI, undan valinum, tí hon situr í fongsli og hevur verið gift útlendingi.



## USA meiri sólorku

Í USA vísir ein nýggj frágreiðing, at við at seta upp 10 milliónir sólskermar kunnu amerikanararnir fáa 10 prosent av sínari orkunýtslu frá sólini um tjúgu ár. Frágreiðingin hevur vakt ans og hevur fingið serliga góða móttøku frá teimum politikarunum, sum vilja hava samfelagið at útbyggja sólorkuna. Hesir politikararnir vísa á, at á hvørjum ári keypir USA olju úr øðrum londum fyri 350 milliardir dollarar, og at tað tí er umráðandi at útbyggja orkukeldur sum sólorkuna og harvið avmarka oljuinnflutningin.



*Matstovan Áarstova er gamla Hotel Durhuus og Knútsstova*





*Sera hugnaligt er inni í Áarstovu, og staðið osar av atmosferu*



*Gamla seymimaskinan, sum gamli Dyrhuus seymaði segl á, er millum lutirnar í matstovuni*

# Áarstova osar av atmosferu

**Móttøka verður í dag frá klokkan 14 til 17 í nýggju matstovuni, Áarstova, og so verða dyrnar lætnar upp fyri viðskiftafólki sjálvan Grækarismessudag**

MATSTOVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fyri tveimum árum síðani keypti Beinta Jacobsen gamla Hotel Djurhuus. Síðani hevur verið arbeitt við spurninginum um, hvussu bygningurin best kom til sín rætt, og hvussu hurðarnar høgligast kundu sláast upp fyri almenninginum.

Úrslitið gjørdist ein matstova, sum skal rekast av eigaranum av Café Natúr, Rúna Olsen.

– Vit settu okkum í samband við Rúna at vita, um hann hevði áhuga fyri einari matstovu, og hann tók beinanvegin av. Ætlanin er, at bæði støðini skulu arbeiða saman soleiðis, at matligi parturin av virkseminum fer fram her í Áarstovu, sigur Petur Jacobsen, stjóri á P/F Løkir, sum er sonur Beintu og Ejler Jacobsen.

Farið var rættiliga í holt við at seta bygningin í stand í september í fjør, og nú er so klárt at byrja matstovuvirksemið.

– Vit vildu fegin varðveita gamla stílin, og tí settu vit okkum í samband við Sverra Heinesen frá Sp/F Rúm, sum hevur designað hølini. Húsini rúma jú stórari mentan, og tað hevur eydnast okkum at fingið fatur á nøkrum søguligum lutum, sum eisini verða umrøddir í sanginum hjá Hans Andreas Djurhuus, »Ein gomul kista av kamfertræ«. Millum annað seymimaskinan, sum gamli Dyrhuus seymaði segl á, sigur Petur Djurhuus.

### Føroysk rávøra

Hølini eru sera hugnalig, og tey beinleiðis osa av atmosferu. Soleiðis sum upprunasniðið var, eru húsini deild upp í fleiri ymisk smá høli, sum hvørt hevur sítt søguliga navn.

– Pláss er fyri 50 gestum, og matskráin verður norðurlendsk. Tó verða eisini føroyskir specialitetir at fáa, og vert er kanska at nevna, at borðreitt fer at verða við ræstari súpan. Aðrir serføroyskir verðar verða eisini at fáa, eitt nú nógv gott frá havinum, og dentur verður lagdur á, at rávøran í størstan mun er føroysk, sigur Petur Jacobsen.

Somuleiðis verður dentur lagdur á mentan, og eitt nú verða ymsar framsýningar havdar av og á í hølunum.

Móttøka verður í dag frá klokkan 14 til 17, har Petur Jacobsen fer at bjóða vælkomin, áðrenn Finnur Johannesen fer at greiða eitt sindur frá søguni á staðnum.

Borgarstjórin, Heðin Mortensen fer at innvíga hølini, og Jens Marni Hansen fer at syngja nøkur løg, eitt nú »Ein gomul kista av kamfertræ«